KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð – skipandi fundur fyri býráðssetuna 2017-2020

**Dagfesting:** 22.11.2016 kl. 19:00
**Málnr.:** 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Kristian Eli Zachariasen, Atli S. Justinussen, Signhild V. Johannesen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óli M. Lassen, Beinir Johannesen, Beinta Klakstein, Herfrí J. Sørensen og Tummas J. Lervig.

Varalimir:

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 103/16 | 16/01194-4 | Val av borgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020 | 1 |
| 104/16 | 16/01194-5 | Val av 1. og 2 varaborgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020 | 3 |
| 105/16 | 16/01194-6 | Val av limum í fíggjarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020 | 3 |
| 106/16 | 16/01194-7 | Val av limum í trivnaðarnevndina Børn og Ung fyri valskeiðið 2017-2020 | 4 |
| 107/16 | 16/01194-8 | Val av limum í trivnaðarnevndina Eldri og Bústaðir fyri valskeiðið 2017-2020 | 5 |
| 108/16 | 16/01194-9 | Val av limum í havna- og vinnunevndina fyri valskeiðið 2017-2020 | 6 |
| 109/16 | 16/01194-10 | Val av limum í mentanarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020 | 6 |
| 110/16 | 16/01194-11 | Val av limum í teknisku nevndina fyri valskeiðið 2017-2020 | 7 |
| 111/16 | 16/01194-12 | Val av limum í umhvørvis- og býarskipanarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020 | 8 |
| 112/16 | 16/01194-13 | Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2017 | 9 |

## 103/16
## 16/01194 Val av borgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 103/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært fráboðan frá valnevndini eru nýggju býráðslimirnir valdir í hesi raðfylgju:

1. Jógvan Skorheim
2. Gunvá við Keldu
3. Kristian Eli Zachariasen
4. Atli S. Justinussen
5. Signhild V. Johannesen
6. Steinbjørn O. Jacobsen
7. Óli M. Lassen
8. Beinir Johannesen
9. Beinta Klakstein
10. Herfrí J. Sørensen
11. Tummas J. Lervig

Fyrst valdi býráðslimurin, Jógvan Skorheim, setir fundin og lesur upp skriv frá valnevndini til býráðsval, har honum verður álagt at boða til fyrsta býráðsfund hjá nývalda býráðnum, sum er fyri tíðarskeiðið 1. januar 2017 til 31. desember 2020.

Val av borgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020
Sambært § 6 í kommunustýrislógini skal borgarstjórin veljast eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. § 2 er soljóðandi:

> **§ 2**. Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum frá teimum, ið eru á fundi, er valt.
> *Stk. 2.* Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.
> *Stk. 3.* Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.

Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið sambært § 6, stk. 2.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, §§ 2 og 6

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja borgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**
Samtykt at velja *Jógvan Skorheim* til borgarstjóra við 6 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig), ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen).

**104/16**
**16/01194 Val av 1. og 2 varaborgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 104/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 6, stk. 3, 2. pkt. í kommunustýrislógini skulu borgarstjórin og varaborgarstjórin veljast eftir meirilutavalháttinum.
Men kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs ásetir í § 2, 1. petti, at valdir verða 1. og 2. varaborgarstjóri. Tá fer valið av 1. og 2. varaborgarstjóra sambært kommunustýrislógini, § 6, stk. 3, 4. pkt. fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3, ið er soljóðandi:

> **§ 3**. Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.
> *Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.
> *Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

Val av 1. og 2. varaborgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið sambært § 6, stk. 3.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 6, stk. 3
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, § 2, 1. petti

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja 1. og 2. varaborgarstjóra fyri valskeiðið 2017-2020.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**
Til 1. varaborgarstjóra er vald *Signhild V. Johannesen*.
Til 2. varaborgarstjóra er vald *Gunvá við Keldu*.

**105/16**
**16/01194 Val av limum í fíggjarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 105/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært kommunustýrislógini er borgarstjórin formaður í fíggjarnevndini. Tí skulu í hesum føri veljast fýra limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fýra limir og fýra tiltakslimir í fíggjarnevndina afturat føstu limunum (borgarstjórin/varaborgarstjórin).

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| | *1. Kristian Eli Zachariasen* |
| *2. Signhild V. Johannesen* | *2. Óli M. Lassen* |
| *3. Tummas J. Lervig* | *3. Beinta Klakstein* |
| *4. Gunvá við Keldu* | *4. Atli S. Justinussen* |
| *5. Herfrí J. Sørensen* | *5. Beinir Johannesen* |

**106/16**
**16/01194 Val av limum í trivnaðarnevndina Børn og Ung fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 106/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er trivnaðarnevndin Børn og Ung ein føst nevnd, og sambært § 24 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 24

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í trivnaðarnevndina Børn og Ung.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| *1. Beinta Klakstein* | *1. Kristian Eli Zachariasen* |
| *2. Signhild V. Johannesen* | *2. Óli M. Lassen* |
| *3. Tummas J. Lervig* | *3. Óli M. Lassen* |
| *4. Beinir Johannesen* | *4. Gunvá við Keldu* |
| *5. Hefrí J. Sørensen* | *5. Atli S. Justinussen* |

**107/16**
**16/01194 Val av limum í trivnaðarnevndina Eldri og Bústaðir fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 107/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir ein føst nevnd, og sambært § 25 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 25

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í trivnaðarnevndina Eldri og Bústaðir.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| *1. Beinta Klakstein* | *1. Óli M. Lassen* |
| *2. Signhild V. Johannesen* | *2. Tummas J. Lervig* |
| *3. Kristian Eli Zachariasen* | *3. Tummas J. Lervig* |
| *4. Gunvá við Keldu* | *4. Beinir Johannesen* |
| *5. Herfrí J. Sørensen* | *5. Atli S. Justinussen* |

**108/16**
**16/01194 Val av limum í havna- og vinnunevndina fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 108/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er havna- og vinnunevndin ein føst nevnd, og sambært § 29 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 29

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í havna- og vinnunevndina.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

Limur:
*1. Tummas J. Lervig*
*2. Kristian Eli Zachariasen*
*3. Óli M. Lassen*
*4. Atli S. Justinssen*
*5. Beinir Johannesen*

Tiltakslimur:
*1. Signhild V. Johannesen*
*2. Beinta Klakstein*
*3. Signhild V. Johannesen*
*4. Gunvá við Keldu*
*5. Herfrí J. Sørensen*

**109/16**
**16/01194 Val av limum í mentanarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 109/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er mentanarnevndin ein føst nevnd, og sambært § 28 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 28

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í mentanarnevndina.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| *1. Signhild V. Johannesen* | *1. Tummas J. Lervig* |
| *2. Beinta Klakstein* | *2. Kristian Eli Zachariasen* |
| *3. Óli M. Lassen* | *3. Kristian Eli Zachariasen* |
| *4. Gunvá við Keldu* | *4. Beinir Johannesen* |
| *5. Atli S. Justinussen* | *5. Herfrí J. Sørensen* |

**110/16**
**16/01194 Val av limum í teknisku nevndina fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 110/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er tekniska nevnd ein føst nevnd, og sambært § 26 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 26

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í teknisku nevnd.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| *1. Óli M. Lassen* | *1. Signhild V. Johannesen* |
| *2. Tummas J. Lervig* | *2. Signhild V. Johannesen* |
| *3. Beinta Klakstein* | *3. Kristian Eli Zachariasen* |
| *4. Atli S. Justinussen* | *4. Gunvá við Keldu* |
| *5. Steinbjørn O. Jacobsen* | *5. Beinir Johannesen* |

**111/16**
**16/01194 Val av limum í umhvørvis- og býarskipanarnevndina fyri valskeiðið 2017-2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 111/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er umhvørvis- og býarskipanarnevndin ein føst nevnd, og sambært § 27 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 27

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í umhvørvis- og býarskipanarnevndina.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| *1. Kristian Eli Zachariasen* | *1. Tummas J. Lervig* |
| *2. Óli M. Lassen* | *2. Beinta Klakstein* |
| *3. Signhild V. Johannesen* | *3. Tummas J. Lervig* |
| *4. Gunvá við Keldu* | *4. Herfrí J. Sørensen* |
| *5. Beinir Johannesen* | *5. Atli S. Justinussen* |

**112/16**
**16/01194 Áseting av føstu almennu býráðsfundunum fyri árið 2017**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 22.11.2016 | 112/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2017:

| | |
|---|---|
| 26. januar | 29. juni |
| 23. februar | 28. september |
| 23. mars | 26. oktober |
| 4. mai | 16. november |
| 1. juni | 14. desember |

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir í býráðshøllini - Nólsoyar Pálsgøta 32, Klaksvík.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

*§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

**Býráðsins samtykt 22-11-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við teimum í tilmælinum dagf. 17-11-2016 uppskotnu fundardøgunum fyri 2017.